Løgtingsmál nr. 12.

LM-088/2023

Ummæli
Uppskot til Løgtingslóg um fosturtøku

Amnesty International Føroyar
amnesty@amnesty.fo
+298 235817

YVIRSKIPAÐAR VIÐMERKINGAR

Amnesty International Føroyar fegnast um, at landsstýrismaðurin í lógarmálum, Bjarni K. Petersen, hevur tikið stig til at endurskoða føroysku abortlóggávuna.

Fyrst og fremst vilja vit vísa á, at tað er av alstórum týdningi, at vit fáa eina dagførda abortlóg, tí verandi abortlóggáva virðir ikki rættindi hjá kvinnum[1], sum kunnu gerast upp á vegin. Abort er ein mannarættindaspurningur, og lond hava skyldu at tryggja, at kvinnur sjálvar kunnu taka avgerðir um egna reproduktión[2]. Amnesty Føroyar gleðist tí um, at stig nú verða tikin, so at Føroyar kunnu koma at liva upp til hesar skyldur. Tað hevði verið eitt stórt fet fyri kvinnurættindi í Føroyum, fingu vit eina lóg, sum virðir kropsliga sjálvavgerðarrættin hjá kvinnum.

Í ummælisskrivinum gera vit viðmerkingar til partar av lógaruppskotinum og vísa á nøkur av sjónarmiðunum hjá Amnesty International um abort og abortlóggávu.

RÆTTURIN AT TAKA ABORT

Avleiðingar av strangari abortlóggávu

At banna abortum førir ikki við sær, at kvinnur ikki fáa tørv á abortum. Út frá hagtølum síggja vit, at tað ikki er stórvegis munur á talinum av abortum í londum, sum loyva abortum og londum, sum ikki loyva abortum[3]. Sambært alheimsheilsustovninum hjá ST, WHO, førir strong lóggáva hinvegin við sær, at abortir verða ótryggar, tí tá leita kvinnur sær aðrar loysnir[4].

Í Føroyum hava vit í dag eina lóg, sum í ávísum førum loyvir abort, men sum í ongum førum setur kvinnuna, sum er upp á vegin, í miðdepilin. At lógin er ógreið, førir við sær ein ótryggleika fyri kvinnur, sum ynskja abort, og fyri læknarnar, sum skulu meta um, hvørt kvinnan lýkur krøvini í lógini. Verandi lóg er harumframt ein revsilóg, sum skapar ótta fyri fongsulsrevsing. Av tí at tað bert er loyvt at taka abort undir ávísum umstøðum, kenna kvinnur seg noyddar at smoyggja sær í heilsuverkinum ella at leita sær av landinum fyri at fáa ta heilsutænastuna, teimum tørvar. Ein avleiðing av verandi abortlóg er tí, at kvinnur í Føroyum ikki hava javnbjóðis møguleikar at fáa abort. Summar kunnu leita sær av landinum fyri at fáa abortina, teimum tørva, meðan hetta ikki ein fíggjarligur møguleiki hjá øllum.

---

[1] Okkara sjónarmið fevnir um gentur, kvinnur og øll, sum kunnu gerast upp á vegin.

[2] Human Rights Committee, K.L. v Peru, Comm. No. 1153/2003, UN Doc. CCPR/ C/85/D/1153/2003 (2005) (hereinafter: Human Rights Committee, K.L. v Peru); CEDAW Committee, L.C. v Peru, Comm. No. 22/2009, UN Doc. CEDAW/C/50/D/22/2009 (2011) (hereinafter: CEDAW Committee, L.C. v Peru), para. 8.15. 13 Human Rights Committee, Mellet v Ireland, supra note 6, para. 7.7. See also Human Rights Committee, L.M.R. v Argentina, Comm. No. 1608/2007, UN Doc. CCPR/C/101/D/1608/2007 (2011) (hereinafter: Human Rights Committee, L.M.R. v Argentina), paras 9.3, 9.4.
CESCR Committee, General Comment 22 (2016) on the right to sexual and reproductive health (Article 12 of the ICESCR), UN Doc. E/C.12/GC/22 (2016) (hereinafter: CESCR Committee, General Comment 22), para. 28.

[3] https://youthsextion.files.wordpress.com/2011/05/2011facts-iaw.pdf

[4] https://www.who.int/news-room/fact-sheets/detail/abortion

Hóast ynski eru um, at kvinnur ikki taka abort ella at tað verða so fáar abortir framdar sum gjørligt, ber ikki til at lóggeva seg frá abortum. Kvinnur hava altíð tikið abort og kvinnur fara altíð at taka abort - sama hvat lógin sigur. Við lógaruppskotinum verður ábyrgd tikin av at tryggja tryggar umstøður fyri kvinnur, og eisini verður víst á, hvussu tað kann verða arbeitt fyri at minka um talið av abortum.

Amnesty International um abort og abortlóggávu

Sjónarmiðið hjá Amnesty International um abort og abortlóggávu byggir á altjóða mannarættindalóg og -reglur[5] umframt á kanningar av avleiðingunum av strongum abortlóggávum[6]. Tá kvinnur ikki hava møguleikan at velja abort, verða ávís grundleggjandi rættindi hjá teimum ikki vird. Í altjóða mannarættindasáttmálum er rætturin at taka avgerðir um egna heilsu, nøring, framtíð og rætturin til javnrætt, til ikki at vera fyri mismuni og til virðing fyri og verju av privatlívinum staðfestur. Hesi rættindi verða ikki vird, loyva vit ikki kvinnum at avgera um egið lív og viðgongu.

Kvinnan skal tí hava ræðið at taka avgerð um egna nøring og viðgongu við virðing fyri hennara rættindum, sjálvavgerðarrætti, tign og tørvi. Avgerðin skal takast av egnum vilja uttan tvingsil, harðskap ella hóttanir. Eingin kvinna skal verða trýst at taka abort, og heldur ikki skal nøkur kvinna verða noktað at taka abort.

Umframt at lógartryggja kvinnum rættin til abort er eisini týdningarmikið, at forðingar at útinna hendan rætt verða tiknar burtur. Lond hava skyldu til at tryggja, at øll hava javnbjóðis atgongd til abort, til eftirviðgerð í samband við abort og til kunning um abort, bæði sambært lógini og í verki.

Amnesty International Føroyar gleðist um, at rættindini hjá kvinnuni eru miðdepilin í lógaruppskotinum.

Abort skal avkriminaliserast

Amnesty International heitir á, at abort verður avkriminaliserað, og at tað verður tryggjað, at hvørki kvinnan, sum er upp á vegin, heilsustarvsfólk og onnur eru í vanda fyri at verða revsaði fyri at leita sær ella hava tikið eina abort, framt eina abort ella hjálpt øðrum við at fáa ella fremja eina abort[7].

Amnesty Føroyar gleðist um, at kvinnan ikki verður revsað og mæla vit til, at heilsustarvsfólk ella onnur, ið hjálpa, heldur ikki verða tað.

Nøringarrættvísi - eitt breitt perspektiv

Tað er gleðiligt, at tað í viðmerkingunum til lógaruppskotið sæst, at hugsað verður um abort og abortlóggávu úr einum breidri sjónarhorni, og at sosial og fíggjarlig viðurskifti umframt seksualupplýsing verða tikin við.

Hetta er í tráð við tilmæli hjá Amnesty International at hugsa um nøringarrættvísi heldur enn um abort uttan ein sosialan kontekst. Nøringarrættvísi er ein samanrenning av nøringarrættindum og sosialum rættvísi. Í stuttum snýr tað sum um, at upplivingar við fertiliteti, reproduktión og foreldraskapi ikki kunnu skiljast frá sosialu umstøðunum t.d. er møguleikin hjá eini kvinnu at taka avgerðir um egið reproduktivt lív er ávirkað av sosialu og fíggjarligu umstøðunum hjá kvinnuni.

Okkara áskoðan er, at lond mugu tryggja eitt nøktandi livistøði[8]. Tá kunnu kvinnur, sum eru upp á

---

[5] https://www.ohchr.org/sites/default/files/Documents/Issues/Women/WRGS/SexualHealth/INFO_Abortion_WEB.pdf (sí harumframt fótnotu 4)

[6] https://www.amnesty.org/en/wp-content/uploads/2021/05/POL3028472020ENGLISH.pdf

[7] https://www.amnesty.org/en/documents/pol40/7420/2023/en/

[8] https://www.amnesty.org/en/what-we-do/economic-social-and-cultural-rights/

vegin, taka avgerðir um reproduktivu ynskini í tráð við dreymar og ætlanir teirra. Vit gleðast tí um, at sosial og fíggjarlig viðurskifti verða nevnd í uppskotinum.

Seksualupplýsing
Reproduktivt rættvísi fevnir eisini um góða og aldurshóskandi seksualupplýsing og nøktandi kunning um tænastur og stuðul.Í viðmerkingunum til lógaruppskotið verður nevnt, at seksualupplýsing verður uppraðfest. Eisini stendur: *"Fyri at halda talið á fosturtøkum so lágt sum gjørligt, er tað neyðugt at flyta fokus frá forboði til upplýsing, og at fyribygja, at kvinnur koma í ta støðu, at hon verður við barn uttan at ætla tað, og tí møguliga fer at umhugsa fosturtøku"* .

Amnesty Føroyar tekur undir við hesum. Tað ber nevniliga ikki til at lóggeva seg frá abortum - einans frá tryggum abortum. Hinvegin ber til at tryggja, at børn og ung fáa góða og aldurshóskandi upplýsing um t.d. viðgongu, fyribyging og áyrgdarfullar avgerðir. Tað er tí gleðiligt at lesa í viðmerkingunum, at tað í Barna- og útbúgvingarmálaráðnum verður arbeitt við at dagføra og uppraðfesta undirvísingarætlanina í seksualupplýsing í fólkaskúlanum. Vit heita á, at seksualupplýsing eisini verður kravt evni á miðnáms- og yrkisútbúgvingunum. Lond skulu tryggja góða og aldurshóskandi seksualupplýsing, sum m.a. er evidensbaserað, aldurshóskandi, tekur atlit til kyn, seksualitet og er grundað á mannarættindi.

Mark á 12 vikur
Sambært §1 kunnu kvinnur, sum búgva í Føroyum, fáa abort uttan loyvi fram til viku 12. Sum mannarættindafelagsskapur hevur Amnesty International ikki eina meining um, hvar hetta markið skal setast. Tað er uttan fyri okkara arbeiðsøki.

Markið má tó ikki forða fyri, at kvinnan hevur atgongd til trygga og lógliga abort fyri at verja lív og heilsu alla viðgonguna. Ein kvinna skal kunna fáa eina abort so tíðliga sum møguligt og so seint sum neyðugt.

Seksuelli lógaldurin er 15 ár
Sambært § 9, stk. 2, 3 í lógaruppskotinum skal kvinna, sum er undir 18 ár hava samtykki frá foreldrum fyri at fáa abort, ella kann hon søkja samráðið um at sleppa undan samtykkinum. Amnesty Føroyar mælir til, at hetta aldursmarkið í staðin verður sett niður í 15 ár, sum er seksuelli lógaldurin í Føroyum.

Tá kunnu gentur taka aðrar seksuellar og reproduktivar avgerðir og t.d. keypa p-bollar og halda áfram við eini viðgongu. Harumframt hava 15 ára gomul rætt til viðgerðir uttan samtykki frá foreldrunum sambært Sundhedslógini § 17: *En patient, der er fyldt 15 år, kan selv give informeret samtykke til behandling. Forældremyndighedens indehaver skal tillige have information jf. § 16, og inddrages i den mindreåriges stillingtagen.*

Harumframt óttast vit, sum eisini verður víst til í viðmerkingunum, at um samtykki frá foreldri/verja er krav, so kunnu avgerðir verða tiknar, sum ikki eru fyri barnsins besta og í tráð við barnsins áhugamál. Somu stúran hevur nevndin, sum varar av Barnarættindasáttmálanum, og vísir á týdningin, at ung hava atgongd til aborttænastu uttan samtykki frá foreldrunum[9]. Undantøkini í § 9 stk. 2,3 skulu óiva tryggja, at genta undir 18 ár fær eina abort, um hon ynskir tað, men hetta tykist sum ein óneyðug og longd gongd.

Fyri at tryggja, at unga kvinnan hevur onkran at tosa við, kann hon eggjað og vegleiddar at tosa við foreldur/verja um støðuna. Ynskja tær ikki at tosa við foreldrini eftir hesa samrøðuna, skal hetta virðast, og heldur skal hon fáa bjóðað annan stuðul áðrenn og eftir inntrivið. Hvussu og í hvønn mun foreldur/verji verða tikin við, má verða avgjørt eftir búnaðarstøði hjá gentuni og eftir sambandinum við foreldur/verja.

---

[9] CRC Committee, General Comment 15, supra note 81, para. III(a)

Um 18 ára aldursmark verður
Verður aldursmarkið tó hóast alt 18 ár, mæla vit til, at $ 10, stk. 3 verður broytt soleiðis, at læknin hevur skyldu til at bjóða gentuni hjálp, heldur enn at læknin kann bjóða gentuni hjálp.

Tað má tryggjast, at gentan hvørki verður tvungin at taka abort ella tvungin at halda fram við viðgonguni.

Eisini kvinnur, sum ikki hava bústað í Føroyum, tørva abort
Sambært § 1 er ein treyt, at kvinnan skal búgva í Føroyum. Vit mæla til, at treytin verður víðkað, so at kvinnur, sum ikki hava bústað í Føroyum, eisini fáa møguleikan at taka eina abort í Føroyum, samsvarandi møguleikanum at fáa aðrar heilsutænastur her. Tað kann gerast ein (bráðfeingis) tørvur hjá føroyskum og útlendskum kvinnum, sum eru í Føroyum í longri tíðarskeið t.d. summarferiu.

MANNAGONGDIR
Lond skulu tryggja, at hindur orsakað av fíggjarstøðu, sosialari støðu, aldri, breki, uppruna, máli ella mentan, ikki ávirkar møguleikarnar í praksis at útinna síni reproduktivu rættindi. Eisini skal atlit takast til tey, sum ikki skilja føroyskt, eru lesiveik ella eru í aðrari støðu.

Ráðgeving og stuðulssamrøða
Amnesty Føroyar tekur undir við, at ráðgeving og stuðulssamrøða er eitt tilboð og ikki eitt krav sambært § 7.

Fyri at ein kvinna hevur neyðuga grundarlagið at taka eina sjálvstøðuga og upplýsta avgerð um, hvørt hon ynskir at halda fram ella støðga viðgonguni, skal hon hava rætt til óhefta kunning, sum byggir á evidens og ikki er ávirkað av persónligum meiningum hjá persóninum, sum veitir kunningina.

Vit mæla tí til, at landsstýrismaðurin setur ein bólk av viðkomandi starvsfólki á økinum at menna hesa kunningina.

Kunning og vitan hjá felagsskapum
Sambært § 12 skal kvinnan hava í boði at søkja sær meira vitan hjá viðkomandi felagsskapi (felagskapirnir undir MEGD verða nevndir sum dømi). Amnesty Føroyar mælir til, at um tað verður eggjað at vitja felagsskapir, so má tryggjast, at hesir felagsskapir veita óhefta kunning.

Søkja um abort
Sambært § 8 skal ein kvinna søkja um at fáa abort. Amnesty Føroyar undrast á, hví umsókn skal sendast um abort, tá ið ein kvinna lýkur treytirnar eftir §§ 1, 2. Sambært uppskotinum hevur kvinnan rætt til abort í hesum førum. Okkum vitandi skal umsókn ikki sendast í samband við aðrar heilsuviðgerðir men t.d. ein ávísing ella at eitt skjal skal fyllast út. Vit mæla frá at gera mun á mannagongdum í abortviðgerð og øðrum viðgerðum í heilsuverkinum.

Lækni skal spyrja um orsøk
Í viðmerkingunum verður nevnt, at læknin skal spyrja um orsøkina til ynskið um abort. Amnesty Føroyar undrast á, hvør orsøkin til tað er.

Samráðið
í § 14 verður nevnt, at landsstýrismaðurin setur eitt samráð. Fyri at tryggja óheftni mælir Amnesty Føroyar frá, at samráðið verður politiskt sett. Eisini mæla vit frá, at tað skal vera semja í samráðnum, heldur enn vanligt fleirtal, serliga um samráðið er politiskt sett.

Í viðmerkingunum til stk. 2 verða leiklutirnir hjá limunum í samráðnum nevndir m.a. at løgfrøðingurin skal tryggja, at lóggávan verður hildin og rættindi og skyldur verða vird. Um leiklutin hjá sosialráðgevaranum verður nevnt, at hann kann meta um sosialu støðuna hjá kvinnuni. Út frá viðmerkingunum skilja vit, at eingin er at tryggja lóggávu, rættindi og skyldur, um løgfrøðingur ikki í

ráðnum. Amnesty Føroyar mælir til, at sosialráðgevin hevur sama leiklut sum løgfrøðingurin, so tað verður tryggjað, at lóggávan verður hildin og rættindi og skyldur verða vird.

Í § 3, stk. 1, nr. 2 verður nevnt, at tað ikki er treyt, at málið er meldað til løgregluna. Tað er gott, tí sum eisini er viðmerkt, so vil eitt krav um at melda málið fløkja og seinka málið. Hetta kemur eisini at gera seg galdandi, um samráðið er í iva, um kvinnan talar satt. Vit vita frá kanningum úr okkara grannalondum, at tað er drúgt at melda eitt neyðtøkumál[10], og at løgreglan ikki í øllum førum kann staðfesta, at ein neyðtøka er farin fram. Vit mæla tí frá, at krav kann setast um, at málið skal meldast.

Orðingar

Vit mæla til at brúka orðingina "upp á vegin" heldur enn "við barn", tí talan er ikki um eitt barn.

Vegna Amnesty Føroyar

Bergtóra Paturson, nevndarforkvinna, og Turið Maria Jóhansdóttir, aðalskrivari

[10] https://amnesty.dk/wp-content/uploads/media/1557/case-closed.pdf